# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til E3/E2

Á E3/E2 eru 4 størv á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum leys at søkja til setan 1. mars 2007 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki.

E3 er ein medisinsk deild við 9 seingjarplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupedagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.
E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við áhuga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

Umvælingar og umleggingar eru á medisinska deplinum. Frá 1. september 2007 flyta sjúklingar frá E3 yvir á B7 í høvuðsbygningin. Nøkur starsvfólk flyta við yvir á B7, og nøkur verða eftir á E2.
Búfólk á E2 verða flutt á onnur røktarheim seinast 31. desember 2008, tá deildin letur aftur.

Leiðslan arbeiðir við eini loysn at fáa annað arbeiði til vega frá 1 januar 2009 til tey starsvfólk, sum verða eftir á E2.

**Krøv til umsøkjarar**
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- fakligan áhuga innan sergreinirnar

**Vit kunnu bjóða**
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga menning
- innleiðslu

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Monicu Brickman, deildarleiðara, lokal 6012 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, t-post asap@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 26. februar 2007 kl. 12.00

## Summarferiuavloysarar 2007

Søkt verður eftir starvsfólki til fulltíðar og parttíðar feriuavloysarastørv í skiftandi vaktum á Landssjúkrahúsinum í tíðarskeiðinum 1. juni til og við 31. august 2007. Avloysarastørvini á seingjardeildunum skulu í minsta lagi verða 2 mánaðir. Vit søkja eftir:

**Sjúkrarøktarfrøðingum**
**Pleygarum**
**Heilsurøktarum**
**Radiografum**
**Ljósmøðrum**

**Økini, ið tørva summarferiuavloysarar í ár, eru**
- hæmodialysu ambulatorium
- kardiologiskt ambulatorium
- hjartadeild
- barnadeild
- føðideild/præmaturstova og ljósmøðraskipanin
- geriatri/rehabiliteringsdeild
- intensiv deild, viðrakning og skaðastova
- operatiónsdeild (við tilkalluvakt frá bústaði/kamari)
- kirurgisk seingjadeild
- psykiatriskar seingjadeildir
- røntgendeildin (við tilkalluvakt frá bústaði/kamar)
- anestesideildin (við tilkalluvakt frá bústaði/kamar)

**Vit ynskja** ágrýtin røktarstarvsfólk við minst tvey ára praksisroyndum við dirvi, góðum samstarvsevnum og evnum til at virka sjálvstøðugt.

**Nærri upplýsingar** fáast við at ringja 304500 til:
- Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Skurð- og Bráðdepilin, lokal 5102, naina@lsh.fo
- Ása Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Medisinski depilin, lokal 6102, asap@lsh.fo
- Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Psyk.depilin, lokal 4102, bergitw@lsh.fo
- Ragna S. Reinert, deildarleiðari á Røntgendeildini, lokal 5507, rtragna@lsh.fo
- Jytte Joensen, virk. leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, lsjytjo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 14. mars 2007

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B6 (avloysarastørv)

Á B6 eru tvey avloysarastørv á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum leys at søkja til setan 1. mars 2007 ella eftir avtalu og til 31. august 2007. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Deildin tekur ímóti innkallaðum og akuttum vaksnum sjúklingum, hevur 15 seingjarpláss og hesar sergreinar: gastroenterelogi, neurologi, endokrinologi, onkologi og hæmatologi.
Arbeitt verður eftir kontaktpersónsskipanini.

Vegna umvælingar á seingjardeildunum B8, B7 og B6, letur B6 aftur frá umleið 1. mars til umleið 1. juni 2007. Sjúklingar og røktarstarvsfólkini verða tá flutt á B7 ella á B8.

Aðrar spennandi avbjóðingar liggja eisini fyri framman við implementering av THS (Talgild Heilsu Skipan).

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- Røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevdu sergreinum

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

**Fyrimunir hava** umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.
Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Ingun Gaardbo, deildarleiðara á B6, lokal 6026 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin** er 26. februar 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B7 (avloysarar)

Á B7 eru 2 avloysarastørv vegna barnsburð, á brøk 1,0 í skiftandi vaktum leys at søkja, til setan frá 1. apríl ella eftir avtalu og til og við 31. desember 2007. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Nýumvælda deildin letur upp 1. mars 2007 og tekur ímóti innkallaðum og akuttum vaksnum sjúklingum. Hevur 15 seingjarpláss og hesar sergreinar: lungasjúkur, nefrologi, rheumatologi, onkologi og hæmatologi. Frá 1. september fær deildin eina nýggja sergrein, rehabilitering av apoplexi sjúklingum. Undirvísing um sergreinina verður áðrenn sjúklingar flyta á B7.

B6 letur aftur til umvælingar frá 1. mars til uml. 1. juni 2007. Sjúklingar og røktarstarvsfólkini verða tá flutt á B7 og á B8.
Aðrar spennandi avbjóðingar liggja eisini fyri framman við implementering av THS (Talgild Heilsu Skipan).

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- Røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevdu sergreinum

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu
- eina nýrenoveraða deild

**Fyrimunir hava** umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.
Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Jónu Augustinussen, deildarleiðara á B7, lokal 6027 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin** er 26. februar 2007 kl. 12.00

## Onnur størv

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1**
**- fyrst og fremst til komm.læknatænastuna og skaðast./móttøkuna**
Umsóknarfreistin er 19. februar 2007 kl. 12.00
sí meira á www.lsh.fo

**Læknaskrivari sum avloysari á Med.**
Umsóknarfreistin er 15. februar 2007 kl. 12.00
sí meira á www.lsh.fo

**Avloysari fyri yvirlækna til Anestesideildina á Bráðdeplinum**
Umsóknarfreistin er 5. mars 2007
sí meira á www.lsh.fo

**Introduktiónsstarv í Almen medisin**
Umsóknarfreistin er 28. februar 2007
sí meira á www.lsh.fo

**Bioanalytikarar**
Umsóknarfreistin er 16. mars 2007 kl. 12.00
sí meira á www.lsh.fo

**Læknaskrivari á Skurðdeplinum**
Umsóknarfreistin er 19. mars 2007 kl. 12.00
sí meira á www.lsh.fo

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo